Nú Frú S skiftir navn og eigara, bjóða vit til

móttøku

leygardagin 23. apríl frá kl. 13.00 - 15.00



Góð upplatingar-tilboð

Frú C

Handilin er á tremur við nýggjum vørum

NÝGGJ VÁRKLÆÐIR



Sosialurin 341800

M.a. stórt úrval av troyggjum, t-shirts, settum, buksum.
Eisini hava vit stórar støddir

Skálabúðin

TEL 31 53 15

Gluggaglæma
snið & handverk

UPPRÁK

SERFRAMSÝNING
snið & handverkskapping 2005

Evni: stásklæðir
til kvinnur og menn

Undir heitinum *Upprák*, lánt úr bókini *"Havið"* eftir Boga Hansen, havfrøðing, skipar Gluggaglæma fyri snið og handverkskapping.

*Upprák* er hugtakandi fyribrigdi - sjógvur verður sogin upp úr djúpari løgum og hevur við sær tøðevni, sum líkasum taða lendið og skapa gróður í løgum, har nóg mikið av ljósi er.
At skapa stásklæðir við íblástri úr hesi máttmiklu sjón - havið.....streymar, vøkstur og lív í ljósi, ljóði og litum, verður avbjóðingin hjá teimum, ið lata verk inn til *Upprák*.

**Serframsýning og kapping**
*Upprák* verður ein serframsýning við útvaldum verkum. Millum útvaldu verkini verður latin virðisløn til tað avrikið, sum á besta hátt sýnir nýskapan og dygd í sniði og handverki við *rák* úr egna mentanararvi okkara.

**Tilfar:** Fritt val

**Virðisløn**
Latin verður ein virðisløn á 10.000 kr.

**Treytir**
Hvør luttakari kann lata inn 2 verk. Navn, bústaður og tlf.nr. skal vera í afturlatnum bjálva fest á avrikið.

**Døming**
Ein nevnd við 3 serkønum innan snið og handverk metir um innlatnu avrikini, kjósar vinnaran og tilskilar sær rætt at velja verk burtur úr til *Upprák*.

**Norðurlandahúsið og Müllers pakhús**
*Upprák* verður sýnt fram í Norðurlandahúsinum í tíðarskeiðnum 11.-30. sept. Um somu tíð, 10.-18. sept., skipar Gluggaglæma fyri søluframsýning í Müllers pakkhúsi. Verk frá *Uppráki* verða dagliga sýnd á palli í Müllers pakkhúsi og vinnarin verður kunngjørdur har 18. sept.

**Ferðaframsýning**
*Upprák* - tað, sum er frammi í tíðini verður ofta kallað rák. Havstreymar nema lond og tjóðir - skilja og binda saman. Vónandi fer føroyska *upprákið* 2005 eisini at nema okkurt av grannalondum okkara.

**Innlatingarfreist**
Avrikini verða at senda inn í viku 34 til:

Randi S. Vang
Niðaragøta 108
188 Hoyvík
tlf. 314265 / 514265

ella latast inn á sama staði leygadagin og sunnudagin tann

27. og 28. august, kl. 14.00 - 18.00.

www.gluggaglaema.fo

í Sosialinum

verða

húsini seld

Lesið Sosialin -so eru tit við!